## 600 mió kinverjar hava nú fartelefon

Telesamskiftið mennist nógv í Kina. Í dag hava 575 milliónir, svarandi til 45% av íbúgvunum fartelefon. Hetta verður staðfest í kinverskum fjølmiðlum, har tað eitt nú framgongur, at av einum samlaðum fólkatali upp á 1,3 milliard hava 575 mió kinverjar eina fartelefon meðan 361 mió hava fasttelefon. Sølan av fartelefonum økist sera skjótt í heimsins fólkaríkasta landi. Almenna tíðindastovan, Xinhua, skrivar, at 1. ársfjórðingin 2008 er talið á fartelefon-haldum økt við 27,3 mió stk.

## Google er sterkasta vørumerki

Annað árið á rað er Google kosið heimsins sterkasta vørumerki. Virði: Umleið 433 milliardir krónur. Tað er kanningarstovnurin Millward Brown, sum lyftir Google heilt upp á topplistan yvir sterkastu vørumerkini í heiminum. Somu staðsetingina fekk Google fyri einum ári síðani. Á næsta plássi liggur General Electric, meðan NBC og Microsoft liggja á 3. og 4. plássi. - Staðsetingin hjá Google kemur í kjalarvørrinum av óvanliga góðum figgjarligum avrikum og góða handfaring av vørumerkinum, sigur Peter Walshe, leiðandi ráðgevi hjá Millward Brown, við Guardian. Vørumerkið Nokia er virðismesta vørumerki í Evropa og hevur eitt virði uppá 221 milliardir krónur.

# í undirgrundini




*Tórbjørn Jacobsen, oljumálaráðharri saman við stjóranum á Jarðfeingi, Petur Joensen*

an, fiskivinnan, kemur í eina kapping við eina einstaka vinnu, sum ikki hevur verið her fyrr. Eg nevndi undir 1. viðgerð av uppskotinum til 3. útbjóðing, at vit eiga at fara undir eitt aðalorðaskifti á tingi um, hvat politiska skipanin heldur vit eiga at gera fyri, at samfelagið er ført fyri at taka ímóti teimum stóru avleiðingum, sum fara at standast av eini oljuvinnu.

Tórbjørn Jacobsen sigur víðari, at tað er eingin ivi um, at ein oljuvinna fer at hava ávirkan á nærum øll øki í landinum, tey sosialu og tey vinnuligu viðurskiftini, møguliga tey átrúnaðarligu viðurskiftini, tey mentanarligu viðurskiftini osfr.

### Ein pottur av olju til mentanina

- Nú hevur tú sjálvur sitið sum mentamálaráðharri. Tað hevur verið nevnt, at inntøkur frá eini oljuvinnu skulu fara nærum óskerdar í ein olju-ella búskapargrunn men eisini til granking. Sær tú ikki eisini nakað skilagott í at brúka oljupengar til at menna okkara mentan?

- Tað var Gunnar Hoydal, rithøvundi, sum segði, at tá ein møgulig oljuframleiðsla fer í gongd í Føroyum, so eigur landið at skipa soleiðis fyri, at ein pottur av hvørjari tunnu av olju fer til føroyska mentan. Tað haldi eg er sera skilagott. Tá vit sótu í andstøðu løgdu vit uppskot fram um ein búskapargrunn, og tá varð tað ein partur av honum, at man lat so og so nógv av oljuinntøkum til mentanina og her ikki minst til at verja og hjúkla um føroyska málið. So vit eiga avgjørt, eisini um vit finna olju, at gera eina veruliga mentanardubbing í Føroyum.

### Oljuframleiðsla og Co2

- Nú merkir oljuframleiðsla meira útlát av Co2. Sær tú nakað moralskt dilemma í, at vit siga okkum vilja taka ábyrgd av umhvørvinum, samtíðis sum vit brennandi ynskja okkum eina føroyska oljuframleiðslu.

- Har kemur ein ávísur divergensur. Har vit øðrumegin siga okkum síggja fram til eina føroyska oljuvinnu, og samtíðis eru vit vertir fyri eini umhvørvisráðstevnu, har man sær, hvussu døpur skýggini eru fyri framman. Hetta eru sera stórir spurningar at taka upp. Men samtíðis vita vit, at olja nógv ár fram verður ein meginorkukelda í framdriftini av bæði skipum, flogførum og elverkum osfr. Tað verður í hvussu er ein vøra, sum man fer at brúka, og tá hon verður framleidd alla aðrastaðni, har hon finst, so dugi eg ikki at síggja, hví hon ikki skal framleiðast her eisini.

- Hvussu sær tú fyri tær, at landsstýrið fer at gera nakað ítøkiligt fyri at fáa útlendsk oljufeløg at gera íløgur í Føroyum?

- Tað er eitt arbeiði, sum er í gongd alla tíðina. Og tað liggur eisini í tí sannroynd, at tá vit fara í tingið við einum uppskoti til leiting, so fara fyrisitingin og landsstýrið í gongd at fáa øll áhugamál, ið peika henda vegin, at vera við og sum vónandi einaferð førir til, at vit raka við olju í undirgrundini.

*”Tað er er ein gamal tanki hjá mær, at man eigur at leggja allar tilfeingisvinnurnar saman í eitt ráð.”*

*”Finnur tú olju, og eitt stórt virksemi í landinum stendst av tí, so má tann politiska skipanin gera sær greitt, at tað fer at hava eina stóra ávirkan á tað føroyska samfelagið.”*

## Samd vinnunevnd

Vinnunevndin hevur nú viðgjørt uppskotið til 3. útbjóðing til oljuleiting á landgrunninum og heitir á tingið um at samtykkja uppskotið, sum Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður legði fyri tingið herfyri. Tað kemur til 2. viðgerð 5. mai. Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi er fegin um, at tað loksins eydnast at gera útbjóðingina til veruleika. So skjótt tingið hevur endaliga samtykt hana verður farið at gera klárt til at fáa útbjóðingina út til oljufeløgini. Umsóknir skulu so latast inn til eftir summarfrítíðina og gongst væl, so verða loyvini latin í oktober ella november.

(JM)

## Nýggj oljufeløg vísa áhuga

Nú Jarðfeingi hevur latið upp fyri gomlum data frá leiting og kanningum á føroyska landgrunninum hevur tað víst seg, at fleiri ”nýggj” oljufeløg hava víst hesum ans og hava ynskt at fáa upplýsingar og at verða kunnað sohvørt. Hetta upplýsir Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi. Hann sipar til, at tá leitiloyvi eru vorðin so og so gomul, tá fellur freistin fyri at kunna almannakunngera upplýsingar burtur. Hesin áhugi frá øðrum oljufeløgum enn teimum, sum eru virkin á føroyaøkinum í dag, kann fáa stóran týdning fyri eitt nú útbjóðing, sum stendur fyri framman. Petur Joensen vil ikki upplýsa, hvørji feløg talan er um, men sambart keldum hjá blaðnum, so hava fleiri av teimum stóru altjóða oljufeløgunum leingi sitið á síðulinjuni og fylgt oljutilgongdini við Føroyar, eitt nú franska Total, amerikanska ExxonMobile og kanadiska Petro Canada.

(JM)